

# Dystaryvirlit

**Formula-deildin:**
(sunnudag)
HB – VB/SUMBA
EB/STREYMUR – NSÍ
AB – KÍ
GÍ – B36
SKÁLA – B71

**1. deild:** (leygardag)
B68 – SÍ
ÍF – NSÍ
LÍF – KÍ
HB – FSV04
TB – B36 (sunnudag)

**2. deild** (sunnudag)
SKÁLA – GÍ
ÍF – MB
B68 – EB/STREYMUR
KÍ – B36
FRAM – FSV 04

# Royna at gloyma gul

**Í EB/Streymi kenna teir seg ikki hava nakað at tapa, og í NSÍ vilja teir ikki tosa um at vinna annað enn júst hesa uppgerðina**

EB/STREYMUR-NSÍ
*Jóannes Hansen*

Í báðum legum siga teir seg vera tilvitaðar um, at tað fer illa at bera til at røkka heilt upp á tindin, um ikki full úrtøka fast burturúr toppuppgerðini, sum sunnudagin verður í Streymnesi, og tað kennist á báðum pørtum, at tað ikki er nóg mikið at fáa eitt stig burturúr javnleikinum, sum tykist ikki so lítið sannlíkur.

Um hesa tíðina fyri einum ári síðani fór favorittstøðan at kennast tung í Sundalagnum, og tað sást aftur á avrikunum, sum ikki vóru so sannførandi, sum tey høvdu verið. Tað kostaði FM heitið, ið teir vóru so tætt við at vinna.

Tvær tær seinastu ferðirnar hevur tað kenst sum um, at EB/Streymur eftir leikligan aldudal, aftur hevur verið á gamla sporinum, men tað verður lítið prátað um FM møguleikan:

- Árið varð bjargað, tá ið vit vunnu steypakappingina og harvið tryggjaðu okkum rættin at luttaka í altjóða fótbólti næsta summar. Vit eru so mikið aftanfyri oddaliðini, at tað ikki verður tosað um gull í landskappingini. At vit longu hava vunnið meiri, enn vit áður hava megnað, hevur higartil borið við sær, at vit hesar seinastu ferðirnar hava spælt púra frítt, og tað hevur hilnast væl, sigur EB/Streyma liðformaðurin Egil á Bø:

- Uppgerðirnar ímóti NSÍ plaga at vera sera tættar, og soleiðis rokni eg eisini við, at tað verður hesa ferð.

Tað er greitt, at Zsolt Zekeres ikki verður við sunnudagin, og at stutta skeiðið hjá honum í Streymnesi longu er liðugt. Hann er meniskskaddur og er farin aftur til Ungarn at fáa viðgerð. Tað verður ikki roknað við, at hann fer at koma aftur henda vegin.

René Tórgarð og Hans Pauli Samuelsen hava verið á landsliðsferð og skuldu venja í kvøld fyri fyrstu ferð í hesi vikuni. Arnbjørn Hansen hevur verið upptikin av U-21 landsliðnum. Hann vandi í gjárkvøldið fyri fyrstu ferð í hesi vikuni.

Spenningurin er stórur í Runavík, um tað endiliga skal fara at eydnast hjá NSÍ at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð. Liðformaðurin, Óli Hansen, undirstrikar, at tað á liðnum ikki verður fokuserað so nógv upp á endastøðuna, men upp á einstøku uppgávuna, sum liggur fyri framman, og hon kennist stór hesa ferð:

- Vit spældu 1-1 ímóti teimum á heimavølli, og í Streymnesi taptu vit eitt sindur misvísandi 1-0. Tað verður tætt aftur hesa ferð, og tað er eingin ivi um, at vit fara eftir sigrinum, sigur Óli Hansen.

Allir spælararnir hjá NSÍ eru tøkir. Orsaka av landsliðskjansi hava fleiri spælarar verið burturi frá venjing hesa seinastu vikuna. Jens Martin Knudsen, Jóhan Troest Davidsen, Christian Høgni Jacobsen og Hjalgrím Elttør hava verið í Litava, og Bogi Løkin og Einar Hansen hava verið á U-21 landsliðnum. Einar Hansen noyddist út longu í steðginum í dystinum ímóti Grikkalandi mikudagin, men hann er tøkur aftur.

## Við – ikki við

**Ikki við: Morten Overgaard (skaddur)**
**Ivasamur: Hanus Jacobsen (brákað rivjabein)**

**Við aftur: Jákup Mikkelsen, Alex José dos Santos og Mikkjal Thomassen (eftir leikbann)**
**Ikki við: Sylla (burturstaddur)**
**Ivasamur: Bergur Midjord (vøddaskaða)**

**Við aftur: Flavio Lucio Silva de Santana (eftir leikbann)**
**Ikki við: Eirikur Poulsen (leikbannaður)**

**Ikki við: Zsolt Zekeres (meniskskaddur)**

**Við aftur: Atli Gregersen (eftir leikbann)**
**Ikki við: Sámal Joensen (knæskaddur), Poul Ennigarð (fluttur av landinum)**

# Soltin úrtøka hjá báðum pørtum



**B71, sum bara hevur vunnið eitt stig síðani summarsteðgin, er ikki sloppið heilt undan hóttanini av niðurflyting**

SKÁLA-B71
*Jóannes Hansen*

Tað eru tvey lið, sum tað síðani summarsteðgin ikki hevur hilnast væl hjá, sum sunnudagin hittast á Skála. B71 hevur bara vunnið eitt stig seinastu fimm ferðirnar, og Skála hevur ikki fingið annað enn stigini í sigrinum í Runavík.

Sandoyingar eru seks umfør undan kappingarenda seks stig frammanfyri AB, og tað skal vilja rættuliga illa til, um B71 skal missa plássið í bestu deildini, men um AB fær fult ímóti KÍ, og B71 einki fær á Skála, so kann tað gerast heilt spennandi, tá ið B71 í næstsíðsta umfari fer at vitja á Argjum.

Á Skála hevur John Petersen ikki verið til venjingar í hesi vikuni. Undan summarsteðginum var tað hann, sum gav góðan ílástur til barndómsfelagið, ið harvið tryggjaði sær stigini, sum nú halda niðurflytingarhóttanini burtur. Í hesi vikuni hevur hjálparvenjarin, Kristmund Johannesen, staðið fyri venjingunum.

Magnus Olsen og Símun Rógvi Hansen úr B71 hava verið upptiknir av U-21 landsliðsfótbólti í hesi vikuni. Tað sama hevur Levi Hanssen á Skála, og Pauli G. Hansen hevur verið í Litava við landsliðnum.